# TILTØK

**»Tíð til Gud«**
Úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21, vit fara at síggja ein ugndómsfilm. Aftaná er drekkamunnur. Verið hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Hygg, Hann kemur! Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen. Felags døgurði eftir gudstænastuna.

**4. grein skótar**
Vit hittast í KFUK mánadagin kl. 19.30 til basararbeiði og upplestur.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 møti, Palli Petersen talar, kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti har Toril og Niels Edvard Olsen leiða og tala. Mánadagin kl. 17 og 19 skótamøti.

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20 húsmøti hjá Anju og Vagn í Geil, Reynstún 24, Argir.
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. Kids.
Leygarkvøldið verður einki ungdómsmøti vegna møti í Klaksvík.
**Broyting:** Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardagin kol. 11.30 Orðsinstænasta v/kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsinstænasta við kommunión í Mariukirkjuni.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 sangmøti við Manskórinum.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld verður einki ungdómsmøti vegna møtirøð í Klaksvík.
Í morgin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Ólavi Jacobsen, kl. 11.30-12.45 barnagudstænasta, kl. 18 kvøldmøti v/ Frank Jacobsen, kl. 22 útimøti v/ samkomuni í Hoyvík.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.
Telefonandaktin: 424741.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 18 møti við Thorstein Johannesen. Innsavnan til Heimamissiónina.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnudagin kl. 18 Alphaskeið í Unitum.
Mikudagin kl. 17.30-19.30 Miðdepilin.
Hósdagin kl. 16-17.30 Urtagarðurin.

**Ørkin, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 evangeliskt møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið einki opið hús, vegna stevnuna í ítróttarhøllini í Klaksvík.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Bergur Skovgård.
Barnamøti kl. 11. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Lívsins Orð**
Í dag kl. 17.15 er barnamøti.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við Pola Jacobsen.
Mánadagin kl. 17.00 møta Liljurnar. Øll eru vælkomin í Lívsins Orð.

**Soli Deo Gloria**
Mikumorgunin kl. 6 bøn.
Sunnudagin kl. 14. Av tí at møti er í KÍ-høllini frá hósdegnum til sunnudagin, eru eingin møti í Soli Deo Gloria hesa vikuna.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 lovsangsmøti, kl. 18 møti, Manskórið syngur, innsavnan verður.

**Sands Missiónshús**
Sunnudagsskúlin verður byrjar aftur kl. 14.30. Einki møti sunnukvøldið vegna Manskórið syngur í Skopun og Regin Høgnesen talar. Sigið frá um onkur vil við.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Vegna konfirmatión verður einki møti sunnukvøldið.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldi og leygarkvøldið kl. 21.30 syngur Theodor Petersen. Caféin letur upp kl. 21.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 19 hugnakvøld í hølunum hjá »Fjallbrúður«. Samrøða við Hentzar Joensen um millum annað »Hvønn týdning er tað fyri eldri at hava kristna trúgv«. Nógvur sangur, drekkamunnur, o.a.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið Elisabeth og Sámal Jákup eru við um hesi møti. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 24.9.*
kl. 10-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15 Ítriv í kjallaranum. Seyma fýrkantar saman til teppir til Móðir Theresu felagsskapin. Kortspæl, telving og onnur spøl. **Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491 kostnaður.**
*Týsdagin 25.9.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Kórsangur, Beinta Háberg Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Uppgávufólk – stuttsøga eftir Jeppe Aakjær. Hanna Lisberg hevur týtt og lesur. 3. partur.
*Mikudagin 26.9.*
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði.
Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini hvønn mikudag kl. 10-13.30. Tilm. tlf. 421580/316491 – Anne G. Harlou. Byrjar 3. okt.
kl. 15 Túrur niðan í viðalundina eftir tilfari til jóla
*Hósdagin 27.9.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 28.9.*
kl. 10-17 Opið hús
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

## Konfirmantar á Tvøroyri sunnudagin 30. september 2001

Sára Ejdesgaard, Tvøroyri
Sóleyð Elisabeth Petersen, Tvøroyri
Patricia Samuelsen, Tvøroyri
Durita Vestergaard Sørensen, Tvøroyri
Marin Nielsen, Tvøroyri
Sunniva Mortensen, Tvøroyri
Vanja Gram Leo, Tvøroyri
Vár Hansen, Trongisvágur
Anita Marnersdóttir Lisberg, Trongisvágur
Niels Strøm Rødgaard, Tvøroyri
Andru Jóanesarson, Tvøroyri
Bárður Juul Petersen, Tvøroyri
Jan Egil Johannesen, Froðba
Bjarki Olsen, Froðba
Magnus Pauli West, í Líðini
Aron Joensen, Trongisvágur
Búgvi Jógvansson, Trongisvágur
Hjørleif Elnar Højsted, Trongisvágur
Kaj Vilhelm Meyer, Trongisvágur
Hanus Holm Stórhamar, Trongisvágur
Bjarni Kjærbæk, Øravík

## 90 ÁR

Leygardagin 29. september verður Anette Wang 90 ár. Hon er stødd hjá tvíburasystrini Birgitte Andersen, Jomsborgvej 39, 1. sal, 2900 Hellerup.









# FILMSTEIGURIN

## The Fast and the Furious

Motornarir ýla. Bilarnir standa í røð og bíða eftir tekin. Bilførarnir hyggja hvønn annan í eyguni og teir hyggja eftir telduskíggjanum sum greiðir frá støðuni hjá motorinum.

Fyri framman bíðar ein fjórðings fjórðingur, sum skal koyrast við ferð upp til 250 km/t – á vanligum gøtum í Los Angeles.

So fáa bilarnir tekin, tað hvínur í dekkunum, tá bilarnir fara til stroks, og teir serliga gjørdu motorarnir royna at vinna upp málstrikuna, áðrenn nakar annar gera tað. Nógvir pengar eru upp á spæl, men tað týdningarmesta av øllum er virðingin.

Hjá Brian snýr tað seg fyrst og fremst um at verða góðkendur af kappingarkonginum Dominic, og tað eydnast eisini, tá Brian bjargar honum undan løgregluni, tá teir eru í holt við eina av teimum ólógligu kappingunum.

Brian hevur fingið til uppgávu at avdúka, um Dominic og hansara harkalið standa aftan fyri ránum móti lastbilum, sum eru í fullari ferð á landavegnum.

Men støðan gerst trupul av, at Brian verður forelskaður í systur Dominic, og so er spurningurin, sum Brian vil gera tað, sum er neyðugt...





## Hund og kat imellem

Í allar tíðir er farin fram ein støðugur bardagi um valdið í heiminum. Hetta er eitt náðileyst kríggj, sum kann fara fram í tíni egnu stovu, uttan at tú veitst av tí.

Hetta hevur verið eitt javnt kríggj, men tú verður hendan valdsjavnvágin órógvað.

Tann valdssjúka kettan Mr. Tinkle ætlar nú at gera stórálop á hundarnar, og einaferð med alla gera av, hvør tað er sum ræður í heiminum.

Hundanjósnarnir eru ráðaleysur, og tann mest royndi njósnarin, Top Dog, er burturblivin. Ein nýggjur agentur verður settur at ansa eftir Brody professara og hansara familju, sum er við at gera eina nýggja uppfinning, sum kann staðfesta støðuna hjá hundunum, sum besti vinurin hjá manni.

Stríðið harðnar, og hvussu skal tað ganga okkum øllum, tá loyniligir snigskjúttakettur, harðir leigukattar og loyniligir hundanjósnarar eru at finna allastaðni.




**Frumsýning**
Fríggjadagin 28.09. kl. $21^{00}$
Leygardagin 29.09. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 30.09. kl. $20^{15}$

Fríggjadagin 28.09. kl. $23^{30}$
Leygardagin 29.09. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 30.09. kl. $22^{30}$

**www.in.fo/havnarbio**

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56




**Frumsýning**
Fríggjadagin 28.09. kl. $17^{00}$
Leygardagin 29.09. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 30.09. kl. $16^{15}$

Fríggjadagin 28.09. kl. $19^{00}$
Leygardagin 29.09. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 30.09. kl. $18^{15}$




Fríggjadagin 28.09. kl. $23^{00}$ Leygardagin 29.09. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 30.09. kl. $22^{45}$




Fríggjadagin 28.09. kl. $20^{45}$ Leygardagin 29.09. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 30.09. kl. $20^{30}$




Fríggjadagin 28.09. kl. $18^{30}$ Leygardagin 29.09. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 30.09. kl. $18^{00}$